## Heilivágsídnaðurin er frítikin ábyrgd



Fyritøkur, sum framleiða vaksinu móti svínakrími, vilja vera frítiknar ábyrgd fyri møgulig hjáárin. Heilivágsídnaðurin hevur kravt, at hann verður frítikin fyri ábyrgd fyri møgulig hjáárin av H1N1-vaksinu. Orsøkin er, at tað hevur verið eitt hart tíðartrýst at fáa nýggju vaksinuna á marknaðin. Vanliga er tað ikki loyvt framleiðarum at fáa frítøku fyri ábyrgd, men í hesum føri hevur Danmark eins og onnur lond valt at gera eitt undantak. Tað sigur danski heilsumálaráðharrin, Jakob Axel Nielsen. - Fyri sjúklingarnar merkir tað einki, og høvdu vit ikki góðtikið hesar treytir, hevði vaksinan ikki verið komin á marknaðin, leggur hann aftrat. Bæði Danmark og Noregi fáa sína vaksinu móti svínakrími frá bretska framleiðaranum, GlaxoSmithKline.

# Tekniski Skúlin í Tórshavn fyllir 75 ár í dag

**Tað er áhugavert, at í dag, sama dagin sum Tekniski Skúlin í Tórshavn hevur sín 75 ára føðingardag verður endaliga »kappingartilfarið« í sambandi við at byggja »Skúladeplin við Marknagil« handað skúlamyndugleikunum. Hetta kann ikki annað enn roknast sum ein rimmar føðingardagsgáva til Tekniska Skúlan í Tórshavn**

TÍÐINDASKRIV
*Tekniski Skúlin í Tórshavn*



*Júst í dag á 75 ára føðingardegnum hjá Tekniska Skúla í Tórshavn verður endaliga kappingartilfarið um Skúladepilin í Marknagili handa skúlamyndugleikunum, og tað er vorðið sum føðingardagsgáva, heldur Egon Øregaard, stjóri á Tekniska skúla*

Hugtakið »Skúladepilin við Marknagil« sá dagsins ljós í 1999, tá Signar á Brúnni landsstýrismaður útskrivaði eina almenna hugskotskapping um »Skúladepil við Marknagilsvegin í Tórshavn«.

Í 1997 byrjaði stýrið saman við stjóranum fyri Tekniska Skúlan í Tórshavn at fyrireika umsókn til skúlamyndugleikarnar. Ætlanin var at fara undir at byggja nýggj hølir til Tekniska Skúlan í Tórshavn á tí 40.000 fermetra stóra økinum, sum skúlin eigur, og sum liggur niðan fyri Skúlaheimið við Marknagilsvegin.

Føroya Handilsskúli hevði góð, men ov fá undirvísimgarhølir. Stýrini og stjóranir á Føroya Handilsskúli, og Tekniski Skúlanum í Tórshavn tosaðu saman og var gjørt av, at fara undir eina felags byggiætlan til hesar báðar skúlarnar.

Um hetta mundið tók Eilif Samuelsen, landsstýrismaður, avgerð um, at Føroya Studentaskúli og HF skeið skuldi flytast, og at nýggjur bygningur til skúlan skuldi byggjast úti í Marknagili.

Hetta førdi til, at Arkitektakappingin um »Skúladepilin við Marknagilsvegin« var útskrivað, í 1999 og var vinnarin funnin í 2000.

Í byrjanini var mótstøða á fleiri »frontum« bæðið politiskt og eisini innanhýsis ímóti at byggja tríggjar skúlar undir sama taki. Orrusturnar vóru ikki so fáar og heldur ikki altið so mjúkar.

Nógvar ymiskar kappingar og royndir at fáa gongd á byggingina av skúladeplinum fóru fyri bakka.

Men nú »dagnar« og eru helst tey flestu - bæðið politikarar og onnur samd um, at hesuferð fer at bera á mál.

Endaliga »kappingartilfarið« verður sum áður sagt, latið skúlamyndugleikunum í dag.

Gongur sum ætlað verður farið undir projekteringina av størstu einstøku byggiverkætlanini í Føroya søgu, seinast í hesum árinum.

Ymiskar meiningar og hugsanir eru sjálvssagt um eina so stóra og nýhugsandi nýbygging.

Egon Øregaard, stjóri á Tekniska Skúlanum metir, at hetta helst er størsta frambrotið í nýggjari føroyskari skúlasøgu.

Hann heldur at møguleikarnir eru nógvir.

- Ja, helst er tað bert hugflogið, sum setir mørk fyri teimum møguleikum, sum samansjóðingin av trimum so ymiskum skúlum veitir. Ongin ivi er um, at henda stóra íløgan fer at gagna landi og fólki í størri mun, enn vit í dag duga at ímynda okkum, sigur hann.

Fyri 75 árum síðani - í 1934 - búleikaðust umleið 25.700 fólk í Føroyum, av hesum búðu umleið 3.600 í Tórshavn.

Hindenburg, ríkispresidentur, Týsklands doyði í 1934, og gjørdist Adolf Hitler bæði kanslari og presidentur og útnevndi seg sjálvan til der Führer fyri týsku tjóðina.

Torført er at seta seg inn í, hvussu samfelagsviðurskiftini hesa tíðina vóru heima í Føroyum og enn minni, hvussu viðurskiftini vóru úti í stóru verð. Heimsumfatandi fíggjarkreppa og fyrri heimsbardagi kastaðu enn sínar longu skuggar á dagliga dagin. Hóttanin um enn ein heimsbardaga, dagaði í havsbrúnni.

Hetta vóru umstøðurnar tá Tekniski Skúlin í Tórshavn sá dagsins ljós og var settur á stovn í 1934.

Men hugsjónarmenn í samtíðini sóu ein tørv, og tóku sjálvir stig til at stovna Tekniska Skúlan í Tórshavn - ein skúla, sum var fyri handverkarar.

Hesir úrmælingar vóru greiðir yvir, at lótu teir standa til, var stórur vandi fyri at føroysk handverkaravinna ikki nøktaði fakliga tørvin og tey krøv, sum framtíðin fór at seta.

Hesir »tordu« at bróta upp úr nýggjum og at hugsa øðrvísi enn tey flestu.

Vilhelm Nielsen, smiðjumeistari, Jóhannes Simonsen, múrarameistari, Steingrím Winther, byggimeistari og fleiri við teimum »realiseraðu« setningin -»Man skal forandre for at bevare«- soleiðis sum danski forsætisráðharrin Poul Schlüter, orðaði tað, mong ár seinni.

Hesi 75 árini hevur Tekniski Skúlin í Torshavn ment seg frá at verða ein partur av einari kvøldskúlaskipan, til ein framkomnan yrkis og miðnámsskúla á høgum fakligum støði.

Í løtuni hava uml 310 næmingar sína dagligu gongd á skúlanum. Skúlabygnaðurin hjá lærlingunum er lagaður eftir einari skiftisskipan og eru tað tí í alt uml. 530 næmingar og lærlingar, sum hava tilknýtið til Tekniska Skúlan í Tórshavn.

Útbúgvingarnar sum Tekniski Skúlin í Tórshavn bjóðar fram eru: Lærlingaútbúgvingar, SIT, og framhaldandi útbúgvingar. Harumframt samstarvar Tekniski Skúlin í Tórshavn við Føroya Handilsskúla um Skeiðsdepilin.

Seinnu árini er skúlin farin undir at bjóða fram fleiri nýggjar útbúgvingar so sum:

Framleiðslutøkning, sum er ein 2 ára framhaldandi útbúgving

Byggitøkning, sum somuleiðis er 2 ára framhaldandi útbúgving

Klædna handverkara – sum er ein 2 ára endalig útbúgving

Kosmetikari, sum er ein -2 ½ ára endalig útbúgving

Tekniski Skúlin í Tórshavn er skipaður sum almennur sjálvsognarstovnur við einum seksmanna stýri. Magnus Magnussen er stýrisformaður

Tað eru í dag 75 starvsfólk á lønarlistanum hjá Tekniska Skúlanum í Tórshavn, sum svarar til uml. 69 ársverk.

## Móttøka

Í sambandi við 75 ára dagin fer skúlin at skipa fyri almennari móttøku 20. november klokkan 15 á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin.

Byrjað verður við at skúlin hevur opið hús í Smiðjugerði 1, frá kl. 12.00 til kl. 14.30, har næmingar og lærarar fegin vísa skúlan fram fyri foreldrum, læruplássum og øllum áhugaðum.